# Juventus úti úr steypa-kappingini

Kreppurakta Juventus fekk aftur ein frammaná, tá teir í gjár spældu móti Inter í italsku steypakappingini. Diego legði gomlu damuna á odda, men sum tað fleiri ferðir hevur lagað seg hetta kappingarárið, so snaraði dysturin aftur skeivan veg hesaferð. Lucio javnaði, tá einir 20 minuttir vóru eftir at spæla, og dygst undan leikloki skoraði Mario Balotelli sigursmálið fryi Inter. Sessurin hjá fyrrverandi stórspælaranum, Ciro Ferrara, er nú av álvara farin at ridla, og eitt av nøvnunum, sum verður nevnt sum avloysari, er Michael Laudrup, sum áður hevur spælt fyri Juventus.



# Sveinur steðgar í FSF

Seinastu tvey árini hevur Sveinur Tróndarson verið partur av starvsnevndini hjá FSF, har hann hevur verið formaður í Kappingarnevndini. Talan er um ein sess, sum krevur nógva arbeiðsorku, og spurningurin er, um eg í løtuni hava neyðugu tíðina til hetta. - Men fyrst og fremst er hetta eisini ein sessur, sum ikki sampakkar serliga væl við eitt arbeiði sum tíðindamaður, sigur Sveinur, sum dagliga starvast á Dimmalætting. - Eg haldi tað vera óheppið, at tað á hendan hátt kann sáast ivi um mítt gegni. Tað er óheppið fyri FSF, fyri meg sjálvan og ikki minst fyri Dimmalætting. Tá eg tók av tilboðnum um at stilla upp, var eg í øðrum starvi. Stutt eftir valið fór eg á Dimmalætting, men hóast eg sjálvandi havi hugsað um hetta, so vildi eg ikki fara úr nevndini í ótíð, sigur Sveinur Tróndarson.

# Bæði vunnu

## Hóast Frakland vann á Polandi í millumbólki 2 í gjár, gjørdust bæði liðini vinnarar og komu í hálvfinalurnar



Hilmar Jan Hansen

Fraklendingar vunnu 29-24 á Polandi, og grundarlagið undir sigrinum varð longu lagt í fyrra hálvleiki, sum Frakland vann 15-10. Setningurin hjá fraklendingum var heilt einfalt, at teir bara ikki skuldu tapa fyri polendingum, sum longu undan dystinum høvdu tryggjað sær annað hálvfinaluplássið úr millumbólki 2.

Tað var kanska avgerandi munurin á motivatiónini, tí polska liðið kom so mikið seint í gongd, at tá tað endiliga fekk glið á, var Frakland longu farið avstað. Í seinna hálvleiki fekk Poland minkað um munin, men tað broytti ikki myndina av einum sera sannførandi fronskum liðið, ið tykist vera til reiðar at kappast um enn eitt meistaraheiti.

Í 2008 vann Frakland bronsu í EM, men sama ár vann liðið olympiskt gull – og í fjør endaði Frakland ovast á sigurspallinum við HM-gulli í Kroatia. Hinvegin hevur Poland verið í støðugari framgongd seinnu árini, tí liðið fekk í 2008 sjeyndapláss í EM og fimtapláss í OL, fyri síðani at vinna HM-bronsu í fjør.



**Fronsku landsliðsspælararnir, Didier Dinart og Nikola Karabatic, ansaðu væl eftir polska Marcin Lijewski í gjár**

# Egyptaland og Ghana í finaluni

Asamoah Gyan gjørdist stóra hetjan, tá Ghana í gjár spældi seg í finaluni um afrikanska meistaraheitið í fótbólti, sum verður spæld sunnudagin ímóti Egyptalandi.

Ghana spældi ímóti Nigeria og vann 1-0 við máli, sum Gyan skoraði miðskeiðis í fyrra hálvleiki. – Hetta er heilt ótrúligt, tí vit hava eitt ungt lið, sum fá væntaðu at síggja í finaluni, segði hann eftir dystin.

Hetta er fyrstu ferð síðani 1992, at Ghana hevur spælt seg í eina finalu, og tað megnaði liðið, hóast Nigeria í hálvfinaluni í gjár hevði bóltin meira, men bara ikki fann leiðina til málið.



**Framherjin hjá Ghana, Asamoah Gyan, kundi saktans vera fegin eftir sigurin á Nigeria, tí nú er Ghana fyri fyrstu ferð síðani 1992 komið í eina finalu**

Ghana, sum ikki hevur vunnið kappingina síðani 1982, skal í finaluni spæla ímóti Egyptalandi, sum náðileyst knústi Algeria við einum 4-0 sigri.

Mohamed Zidan, Mohamed Abdelshafi, Mohamed Gedo Nagy og Hosni Abd Rabou við brotssparki skutu málini fyri Egyptaland, sum hevur vunnið tvær tær síðstu kappingarnar um afrikanska meistaraheitið.

hil

# Dystir um vikuskiftið

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

31/01 14.30 VÍF-Stjørnan
31/01 14.30 Neistin-Tjaldur
31/01 15.00 VB-StÍF

**Atlantic Airways-kappingin**

30/01 17.00 H71-StÍF
31/01 16.00 VÍF-Kyndil
31/01 16.00 Neistin-KÍF

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

31/01 14.00 TB-SÍ
31/01 15.00 KÍF-Mjølnir
31/01 16.00 Fleyr-ÍF

**Eik-ligan, menn**

30/01 15.30 SÍ-Mjølnir
31/01 14.00 Fleyr-ÍF

## EM-hondbóltur

**Bólkur M1**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kroatia | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 134 | 123 | 11 | 9 |
| 2 Ísland | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 163 | 149 | 14 | 8 |
| 3 Danmark | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 136 | 134 | 2 | 6 |
| 4 Noreg | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 138 | 135 | 3 | 4 |
| 5 Eysturríki | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 147 | 156 | -9 | 3 |
| 6 Russland | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 140 | 161 | -21 | 0 |

**Bólkur M2**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 135 | 118 | 17 | 9 |
| 2 Pólland | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 148 | 144 | 4 | 7 |
| 3 Spania | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 152 | 133 | 19 | 7 |
| 4 Kekkia | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 142 | 154 | -12 | 3 |
| 5 Týskland | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 127 | 136 | -9 | 2 |
| 6 Slovenia | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 159 | 178 | -19 | 2 |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 11 | 11 | - | 0 | 33 | 3 | 30 | 22 |
| 2 TB | 11 | 8 | - | 3 | 27 | 14 | 13 | 16 |
| 3 Mjølnir | 11 | 7 | - | 4 | 25 | 17 | 8 | 14 |
| 4 Fleyr | 11 | 6 | - | 5 | 21 | 19 | 2 | 12 |
| 5 Dráttur | 12 | 5 | - | 7 | 22 | 22 | 0 | 10 |
| 6 ÍF | 11 | 2 | - | 9 | 6 | 28 | -22 | 4 |
| 7 KÍF | 11 | 0 | - | 11 | 2 | 33 | -31 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 11 | 9 | - | 2 | 29 | 11 | 18 | 11 |
| 2 SÍ | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 19 | 9 | 10 |
| 3 Fleyr | 12 | 5 | - | 7 | 26 | 25 | 1 | 6 |
| 4 ÍF | 11 | 0 | - | 11 | 2 | 27 | -25 | 0 |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 13 | 11 | - | 1 | - | 1 | 374 | 263 | 111 | 23 |
| 2 Tjaldur | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 361 | 263 | 98 | 21 |
| 3 Neistin | 13 | 7 | - | 0 | - | 6 | 336 | 318 | 18 | 14 |
| 4 VÍF | 13 | 4 | - | 0 | - | 9 | 314 | 364 | -50 | 8 |
| 5 StÍF | 13 | 4 | - | 0 | - | 9 | 310 | 383 | -73 | 8 |
| 6 VB | 12 | 1 | - | 0 | - | 11 | 252 | 356 | -104 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 12 | 10 | - | 0 | - | 2 | 390 | 316 | 74 | 20 |
| 2 H71 | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 320 | 326 | -6 | 11 |
| 3 KÍF | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 298 | 320 | -22 | 11 |
| 4 VÍF | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 360 | 352 | 8 | 10 |
| 5 StÍF | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 324 | 338 | -14 | 10 |
| 6 Kyndil | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 293 | 333 | -40 | 10 |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 13 | 11 | - | 1 | - | 1 | 374 | 263 | 111 | 23 |
| 2 Tjaldur | 12 | 10 | - | 1 | - | 1 | 361 | 263 | 98 | 21 |
| 3 Neistin | 13 | 7 | - | 0 | - | 6 | 336 | 318 | 18 | 14 |
| 4 VÍF | 13 | 4 | - | 0 | - | 9 | 314 | 364 | -50 | 8 |
| 5 StÍF | 13 | 4 | - | 0 | - | 9 | 310 | 383 | -73 | 8 |
| 6 VB | 12 | 1 | - | 0 | - | 11 | 252 | 356 | -104 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 12 | 10 | - | 0 | - | 2 | 390 | 316 | 74 | 20 |
| 2 H71 | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 320 | 326 | -6 | 11 |
| 3 KÍF | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 298 | 320 | -22 | 11 |
| 4 VÍF | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 360 | 352 | 8 | 10 |
| 5 StÍF | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 324 | 338 | -14 | 10 |
| 6 Kyndil | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 293 | 333 | -40 | 10 |